# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit halda, at Russland eigur at samstarva við bretar og at flýggja bretska ákæruvaldinum Lugovoj*

*(Condoleezza Rice)*

# Óvanligt veður krevur fleiri hundrað mannalív

**Tað hevur regnað av grimd í Kina í vikuvís, og enn eru eingi útlit fyri, at tað fer at slíta í**

Tað er serliga í landspørtunum Hunan og Shandong, at tað hevur regnað illa, og veðurmenninir siga, at regnið fer at standa við.

Í býnum Jenin í Shandong-landspartinum regnaði tað so illa gjáranáttina, at eftir trimum tímum komu 180 millimetrar niður. Í miðbýnum stóðu gøturnar hálvan triðja metur undir í vatni, og sambært myndugleikunum druknaðu 32 fólk. Minst 6.000 hús stóðu undir í vatni, og umleið 100.000 fólk máttu flytast burtur.

Í Hunan-landspartinum hava meiri enn 100 fólk latið lív í vatnflóðini ta seinastu vikuna, og higartil í ár eru meiri enn 700 fólk druknað har, siga tey almennu tíðindini. Harafturat eru nógv túsund fólk rýmd frá húsi og heimi.



*Tað hevur regnað óvanliga illa í pørtum av Kina, og fleiri hundrað fólk eru druknað*

# Ein pinkukreppa sum fær ein góðan enda

**Russiski forsetin væntar, at diplomatiska kreppan millum Russland og Bretland fer at enda í øllum góðum**

Fyrst kravdu bretar, at russar skuldu útflýggja Andrej Lugovoj, sum sambært bretska ákæruvaldinum myrdi fyrrverandi KGB-mannin Alexander Litvinenko. Moskva svaraði, at tað ber ikki til sambært russiskari lóg. Bretska stjórnin svaraði við at koyra fýra russiskar diplomatar av landinum, og nakrar dagar seinni fingu fýra bretskir diplomatar í Moskva boð um at fara til hús. Tað ljóðaði, at russisku myndugleikarnir umhugsaðu at koyra 80 bretskar diplomatar av landinum.

Politiskir eygleiðarar siga, at viðurskiftini millum Russland og Bretland hava ikki verið so vánalig í mong ár, men nú sigur russiski forsetin, at viðurskiftini fara at laga seg. Talan er um eina pinkukreppu, sigur Putin.

- Eg vænti, at viðurskiftini millum Russland og Bretland fara at rætta seg aftur skjótt, tí bæði vit russar og bretar hava áhuga í, at viðurskiftini skulu koma í rættlag, sigur Vladimir Putin við bretska blaðið The Times. Spurdur, hvussu kreppan fer at enda, svarar russiskiforsetin:

- Eg eri sannførdur um, at hendan pinkukreppan fær ein góðan enda.



*Nýggi bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, hevur gjørt nógv burtur úr kreppuni við russar, men Putin heldur, at talan er um eina pinkukreppu, sum fær ein góðan enda*

## STUTT SAGT

### Ísrael viknar

Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, er sannførdur um, at ísraelski herurin viknar støðugt. Í samrøðu við Hizbollah-leiðaran Hassan Nasrallah í Damaskus í gjár vísti Ahmadinejad á, hvussu stórar trupulleikar ísraelski herurin hevði í bardaganum við Hizbollah í Suðurlibanon seinasta summar. Sambært iransku tíðindastovuni IRNA vísti forsetin aftur, at Iran hevur latið Hizbollah nútímans vápn, soleiðis sum Ísrael og lond í Vesturheiminum vilja vera við.

### Grunnar keypa ov nógv

Týski kanslarin, Angela Merkel, heldur, at ES eigur at gera nakrar reglur, sum skulu seta mark fyri, hvussu stóran part av evropeiskum vinnufyritøkum pengasterkir grunnar uttan fyri ES kunnu keypa. Angela Merkel vísir á, at sterkir grunnar í Russlandi, Kina og Miðeystri hava keypt nógv partabrøv í Evropa í seinastuni, og hon er sannførd um, at talan er um politisk keyp og ikki vinnulig keyp. Fleiri evropeiskir leiðarar taka undir við kanslaranum, og embætisfólk kanna longu, hvussu slíkar reglur skulu orðast.

### Ikki í rættin

Í USA hevur ein landsrættardómari havnað eini umsókn frá fyrrverandi CIA-agentinum Valerie Plaine, sum bað rættin um loyvi til at stevna starvsfólki í Bush-umsitingini, tí umsitingin avdúkaði loyniliga starv hennara sum CIA-agentur. Dómarin sigur, at fólk í almennum starvi kunnu ikki stevnast fyri at hava gjørt nakað, sum hevur samband við teirra arbeiði.